

*Steinunn Djónadóttir Frýdal hvílir seg heima hjá pápanum á Velbastað. Hon fær einki gjørt, og summar dagar gongur framvegis illa at koma upp. Henda dagin var hon rimiliga væl fyri og spákaði sær ein túr í bygdini*
*Mynd: Jens Kristian Vang*



*Mynd: Jóhannus Lamhauge*

# Vitni til omanlop

## **LOP** Gjáramorgunin leyp úr berginum nærindis Gjógv

Randi Jacobsen

Tað leypir ofta í bjørgunum, men sjáldan ber at siga neyvt, nær lopini hava verið.

Men vitni vóru til stóra lopið úr berginum nærindis Gjógv, heiman fyri Stovuna nevnt.

Norrøna kom úr Íslandi, og á dekkinum stóð Jóhannus Lamhauge og prátaði við ein annan mann.

- Vit stóðu og prátaðu um lopið, sum herfyri var á Búgvanum, og tá sóu vit eitt stórt sprutt inni við land, sigur Jóhannus Lamhauge, sum í skundi fekk tikið nakrar myndir.

Hagaparturin hoyrir til funnin. Júst meðan berglopið var, sat hagastýrið á fundi.

randi@sosialurin.fo



*Steinunn var illa við, tá ið hon sá langa og ógvusliga skurðin oman eftir búkinum*

Tað kom eisini væl við.

Men so valdi hon at fara heim til pápan á Velbastað at vera. Tey bæði eru so tætt knýtt, og hóast hon hevði nógv vinfólk i Danmark, kendi hon seg upp á ein máta einsamalla við at vera so langt burtur frá familjuni.

Hóast næstan seks vikur eru gingnar, síðan óhappið hendi, er tað ikki nógv, sum Steinunn fær gjørt.

### Fær einki gjørt

- Eg kann ikki bera meira enn eitt pund í hvørjari hond, tí eg má ikki brúka búkvøddarnar. Eg brúki einar 20 minuttir um at venda mær í songini, og summar dagar sleppi eg als ikki úr songini, sigur Steinunn.

Tað gongur illa hjá henni at koyra bil, men hon ger tað kortini, tí hon hevur so nógv góð vinfólk at vitja.

Sjúkrameldingin gongur til 25. juni, men Steinunn bíðar til eftir summarferiuna at fara niður aftur.

Umframt at læra arbeiðir hon eisini á eini matstovu, har uppgáva hennara er at hjálpa kokkinum við at gera mat.

- Í Danmark havi eg tvey arbeiði, og her geri eg nú einki. Eg verði svøk av at ganga fyri einki, sigur Steinunn.

### Tað gongur rætta vegin

Hon letur væl at, so fitt øll vóru móti henni, eftir at óhappið var hent. Arbeiðsgevarar, lærarar og vinfólk komu at vitja, og tey sendu blómur. Hetta fløvaði.

Á læruplássinum vóru øll líka skelkað av, at slíkt kundi henda. Beinanvegin vórðu jarnstengurnar skiftar út við træstengur, sum bara brotna, um tær loysna.

Steinunn fær tíðina at ganga við at vitja vinfólk og familju. Hon er givin fullkomiliga við at taka heilivág.

- Enn føli eg, hvussu veikur kroppurin er, og eg sovi meira enn vanligt. Tað gongur rætta vegin, men eg kundi hugsað mær, at tað gekk skjotari. Eg skal tó nokk koma fyri meg, sigur Steinunn.

randi@sosialurin.fo

# Reseptheilivágur er persónligur

## **MISNÝTSLA** Ein 32 ára gamal vágamaður er skuldsettur fyri brot á læknalógina við at hava selt reseptheilivág

Randi Jacobsen

Narkopolitiið var mikudagin í Vágum og gjørdi kanningar, og tá varð ein 32 ára gamal maður handtikin og skuldsettur fyri at hava selt heilivág av slagnum Retalin.

Maðurin noktar at hava selt tablettirnar, men hann hevur viðgingið, at hann hevur latið onnur fáa burturav.

Tað er kent, at nógvur heilivágur skiftir hendur millum misnýtarar. Tað vita viðgerðarstovnarnir.

Sambært Bergleif Brimvík, leiðara á kriminaldeildini er hetta fyrstu ferð, at nakar er tikin og skuldsettur fyri slíkan handil.

Maðurin er skuldsettur fyri at hava selt 50 tablettir av Retalin, sum er heilivágur, ið givin verður fyri ADHD. Hetta er resept-heilivágur, sum er persónligur og ikki má latast øðrum. Verður tað gjørt, er tað brot á læknalógina.

randi@sosialurin.fo